HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur 02. februar 2023 kl. 16.30 – 18.00

Á fundinum vóru: Rannvá Mortansdóttir, Jógvan Páll Fjallsbak, Laila Í. Hentze, Kristianna W. Poulsen, Leivur Simonsen, Jens á Skipagøtu og Malan á Dul Nielsen

Avboð: Gunvør Balle

Fundarleiðari: Rannvá Mortansdóttir

Skrivari: Malan á Dul Nielsen

Skrá:

1. Val av fundarstjóra og skrivara

Fundarfrágreiðingin frá skúlastýrisfundi, hósdagin 3. novembur 2022 varð góðkend.

Malan er skrivari, og Rannvá er fundarstjóri.

2. Kunning frá leiðslu

- Innskriving til 1. flokk.

Hoyvíkar skúli tekur 48 næmingar inn í 1. flokk. Restin kemur á ein bíðilista.

- Hølisviðurskifti í innskúlingini og møguligar bygnaðarbroytingar.

Hoyvíkar skúli hevur tosað um at koyra flokkarnar í tvey frá 1. flokki. Her hava vit tvey uppskot til, hvussu hetta kann gerast:

8. og 9. flokkarnir kunnu fara oman í Lítlaskúla og hava t.d. lívfrøði, alis/evnafrøði, týskt og ítrótt seinni á degnum, so tey kunnu fara niðan í Stóraskúla, tá FTS tekur yvir.

Hitt uppskoti¨er, at 1. flokkur heldur til í Lítlaskúla, og so fer komandi 8. flokkur í førleikastovuna, førleikastovan fer í teldustovuna osv.

Hesir tankar hava tikið seg upp, tí lærarar og foreldur hava kært sína neyð um stórar flokkar.

- Matpakkin.fo givin. Nýggjur veitari hevur boðið seg fram við nýggjari tænastu

Vit hava ávís krøv til nýggja veitaran, m.a.skal maturin vera heilsugóður. Niðurstøðan er, at hetta er vert at royna í eina tíð fyri fyrst.

3. Nýtt úr býráðnum viðv. umvæling av skúlanum. (Kristianna)

Ein fundur er komin á skrá. Fundurin er 22. feb. kl.11:00

Tey røttu fólkini skulu seta seg saman fyri at definera røttu loysnina. Til hesa projektlýsingina eru settar 3. mió settar av.

Tað er upp á tal, at sertilboðið skal byggjast út í sambandi við eina eventuella høvuðsumvæling. Hvat gera vit so við skúlan, meðan skúlin verður høvuðs umvældur? Er Hoydalar eventuelt eitt tilboð? Tað má í øllum førum takast hædd fyri hølisviðurskiftunum ta tíðina skúlin er undir umvæling.

4. Innbjóðing til fund við Skúlastýrið í SvL tann 1. mars kl.19:00.

Uppskot til evni, vit kunnu samstarva um? Forskúli er longu settur á skrá. (Rannvá)

Forskúli er nokk tað mest upplagda at samstarva um. Hvør skal hava forskúlan? Eventuelt er tað pláss fyri honum í FTS.

Annars at samstarva um facilitetir hjá hvørjum øðrum. Tað kundi verið upplagt. Hetta krevur eitt ávíst samskifti, so mann veit, hvørjar næmingar, mann fær.

Hitt kontroversiella evnið er, at skúlarnir verða lagdir saman upp á tann mátan, at ein skúli er innskúling og miðdeild, og annar skúlin er hádeild. So hevði ein stjóri verið til báðar skúlarnar og annars varastjórar. Við hesum hevur tú specialiseraðar lærarar til innskúling, miðdeild og hádeild. Hetta er ein spennandi tanki, sum er verdur at taka upp.

5. Fundur við foreldra- og trivnaðarumboð 16/11.

Hvat kom burturúr? Nakað, vit kunnu taka upp ella arbeiða víðari við? (Foreldraumboðini)

Foreldur vóru væl nøgd aftaná vit møttu seinast, og tey komu við ymsum hugskotum um garðdag fyri foreldur, næmingar, lærarar osv. Hetta gevur ognarskap. Onkur kom við einum uppskoti um at tekna okkurt á asfaltið, sum mann kann spæla. Tað virkaði sum ein góður ”felagsandi” um eitt sovorðið tiltak.

Spurningurin er, hvussu nógv mann skal investera í, tí hvør veit, um alt verður rivið niður, tá skúlin verður umbygdur og kann mann byggja hvat sum helst. Tað skal heldur ikki vera so umfatandi at skipa fyri, tí mann skal helst hava mót at gera tað aftur.

Eitt fyrrverandi skúlastýrið hevur aktivt valt ikki at lova næmingum á námsferð, tí tað kann seta foreldur undir óneygt trýst við pengum og innsamling. Men kann mann so gera meir burtur úr seturskúlum? Sum tað er nú, skulu tey á seturskúla í 6. 7. og 8. flokki.
Eitt annað uppskot er Norðplus. Hetta er ein góð uppliving og er gott fyri tað norðurlendska málið. Mann fær stuðul til hesa verkætlan. Hetta er eisini gevandi fyri lærararnar. Fyrrverandi royndir førdu við sær, at lærarar ikki tímdu við, tí tað kravdi ov nógv. Niðurstøðan er, at lærararnir skulu spyrjast, um Norðplus er nakað, sum tey eru áhugað í at vera við.

Vit kunnaðu um umbygging, og tey vóru forvitin eftir at vita, um matarsalur er í nýggju skúlaætlanini.

Eitt annað, sum eisini kom fram er, hví næmingaráðið bara hevur umboð frá 6. – 9. flokk. Skúlastjórin kunnar um, at mann valdi hetta av fyrstan tíð, tí mann helt tey vera nóg vaksin at vera við, hava hugskot osv. Næmingaráðið hevur heldur ikki koyrt so væl, so tí helt mann, at tað var skilabetri bara at hava teir eldru næmingarnir, tí mann vildi hava eitt næmingaráð upp at koyra,

Annars ynsktu foreldraumboðini at møtast oftari og tosa um ymisk, sum tey vildu sleppa at gera.

6. Avtala tíð, har vit kunnu hitta næmingaráðið á skúlanum. (Uppskot frá Jógvan Páll)
Annika skal koma við einum tíðspunkti, og skúlastýrið fær boð frá skúlastjóranum.
Skúlastýrið skal møta lærarunum eina ferð um árið. Tað setur leiðslan á skrá, og leiðslan er ikki við til henda fundin.

7. Ymiskt
In to words – hvussu er við tí? Lærarar eru á skeið í hesum í løtuni, og tað er allarhelst á veg.

Sambært húsavørinum, so fungera vatnkranarnir sum teir skulu. Vatnið er ikki skitið. Kanska beint eftir, at fyltrið er skift. Vatnið er ikki heitt, men mann skal trýsta á knøttin eina løtu, so vatnið gerst kalt.

Eitt bretti datt úr loftinum í fimleikahøllini herfyri. Ein maður fekk brettið í høvdið og fekk pentur í høvdið. Rætti viðkomandi fær boð um hetta.

Fundurin lokin kl. 18:07.